




# Fundir

Vanligu almennu kommunustýrisfundirnir ár 2003 eru ásettir at verða hesar mikudagar kl. 19.00.

| | |
|---|---|
| 15. januar | 9. juli |
| 12. februar | 3. september |
| 12. mars | 24. september |
| 16. apríl | 15. oktober |
| 14. mai | 12. november |
| 11. juni | 26. november |
| | 17. desember |

Fundirnir verða hildnir á kommunuskrivstovuni. Eykafundir verða lýstir í talvuni.

*Yvirlit yvir tey mál, ið koma fyri á fundi, eins og úrrit úr gerðabókini fyri síðsta fund, verða løgd fram á kommunuskrivstovuni til alment innlit 3 dagar áðrenn fundin. Fyrilit verður tikið fyri reglum um tagnarskyldu.*

Mál, sum skulu viðgerast á kommunustýrisfundi, skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fundin.

**Hósvíkar kommuna**



**Skeiðsdepilin við Marknagil – SDM**

TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN

## Access – grundskeið

**10., 17., 24. og 31. januar 2003 kl. 08.30-12.15**

**Endamál**
Lær at nýta Access og at gera tín egna dátugrunn

**Innihald**
- at stovna og arbeiða við talvum til dátu
- at leggja inn dátur - at gera forskriftir
- at skriva út dátu - at flokka og leita í talvum
- at byggja upp ein dátugrunn

**Skeiðleiðari:** Richard Schwartson
**Kostnaður:** Kr. 2.600,00 íroknað frálæru, tilfar og mat
**Tilmelding:** í seinasta lagi 8. jan. 2002

**Skeiðsdepilin við Marknagil**
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374,
t-postur fh-sth@post.olivant.fo



*Vit ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár og takk fyri tað skjótt farna.*

Týsdagin og mikudagin er stongt.

| | |
|---|---|
| Hósdagin | frá kl. 12.00-24.00 |
| Fríggjadagin | frá kl. 12.00-04.00 |
| Leygardagin | frá kl. 12.00-04.00 |
| Sunnudagin | frá kl. 17.00-24.00 |
| Mánadagin | frá kl. 12.00-24.00 |

Týsdagin hevur Cleopatra opið kl. 01.00-04.00
Mikudagin frá kl. 17.00-04.00

***Restaurant***
***Tlf. 3 13430***



## Stongt millum jól og nýggjár

Ongin avgreiðsla er frá mánadegnum 23. desember 2002. Opið er aftur hósdagin 2. januar 2003.

Stuðulsstovnurin
Hoyvíksvegur 72
Postsmoga 3279
FO-110 Tórshavn
telefon +298 319680 – faks +298 319682
E-mail: studul@studul.fo


Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

Sosialurin -tað loysir seg





# Hevur fingið seg royndan

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

Tey, sum eru komin eitt sindur til árs, minnast rokið ið var, tá ið løgtingið miðskeiðis í sjeytárunum samtykti at keypa donsku ferjuna, Morten Mols, at seta í sigling ímillum Suðuroynna og Havnina.

Serliga hørð var mótstøðan frá sambandsflokkinum, har bara suðuroyartingmaðurin, Jákup Mortensen, sáli, setti seg ímóti flokkinum og atkvøddi fyri. Stórir partar av fólkaflokkinum tóku heldur ikki undir við keypinum. Eins og sjálvstýrisflokkurin eisini var ímóti.

Mótstøðufólkini hildu, at tað var ørskapur at keypa so stórt skip til Suðuroynna, tí har ferðaðust so fá fólk, at tað var mangan, at tað ikki bar til at manna ein sjavs umborð, sum onkur tók til.

Og so var beistið harafturat flatbotnað og tað vóru teir, eisini garvaðir sjómenn, sum svóru uppá, at hann fór at hann hólvdist, tí hann var bygdur til sigling á deyðavatni í Danmark.

Men Smyril kom so í 1975 og tað var ein kollveltingfyri Suðuroynna. Fyri fyrstu ferð var heilsølubilur at síggja í Suðuroynni og talið á ferðafólki og bilum fleirfaldaðust eftir fáum árum.

Og tað skerst ikki burtur, at hann eisini hevur fingið seg royndan onkuntíð.

So vítt vit vita, er tað enn ongantíð komið fyri, at hann hevur avlýst siglingina ein heilan dag, øll hesi 27 árini hann hevur siglt.

Nú syngur hann sín svanasong. Í oktober 2004 fær hann nýggjan, meiri framkomnan avloysara og hetta er sostat næstseinasti vetur, hann verður álitið hjá suðuroyingum.

Hesar myndirnar av honum av Smyrli á veg út av Trongisvágsfirði, tók Leivur Nygaard ein illveðursdag í november- og tað skilst, at viðhvørt kann tað vera rættiliga ófýsiligt hjá umborð viðgjørt. Vit lata myndirnar tala fyri seg.





